# HENDURNAR UPP ELLA BUKSURNAR NIÐUR





Hetta er fyrsta ferðin vit royna okkara nýggja tátt »Hendurnar upp ella buksurnar niður«. Vit hava valt at seta ymsum persónum, sum eru alment kend í Føroyum, stevnu, og vit hava spurt tey nakrar spurningar. Tey, sum hava svarað, hava fingið eitt alternativ, og hava tí ikki kunna givið eitt triðja svar, men hava verið noydd at velja ímillum teir báðar givnu møguleikarnar.
Fyrsta offurið í okkara nýggja tátti gjørdist Høgni Hoydal, landstýrismaður.

## #1 Høgni Hoydal

**1. Kall ella Føroya Tele?**
- Føroya Tele

**2. Jolly ella Coca Cola?**
- Coca Cola

**3. Rás 2 ella Útvarp Føroya?**
- Útvarp Føroya

**4. Quality Street ella Roses?**
- Quality Street

**5. Siemens ella Nokia?**
- Siemens

**6. Loysing ella samband?**
- Loysing

**7. Flúgva ella sigla?**
- Sigla

**8. Føroya Bjór ella Restorff?**
- Føroya Bjór

**9. Fótbóltur ella hondbóltur?**
- Fótbóltur

**10. Dimmalætting ella Sosialurin?**
- Dimmalætting

**11. Tomat ella agurk?**
- Tomat

**12. Svart ella hvítt?**
- Svart

**13. Pizza ella grill?**
- Pizza

**14. Fløgu, plátu ella band?**
- Fløgu

**15. Kaffi ella te?**
- Kaffi

**16. Jakka ella frakka?**
- Jakka

**17. Lissur ella karalás?**
- Lissur

**18. Rock ella popp?**
- Rock

**19. Mamma ella babba?**
- Mamma

**20. MacIntosh ella PC?**
- PC

**21. Per ella Poul?**
- Per

**22. Um tú vart ein bilur, hvat slag skuldi tú so verið?**
- Ein jeepur

**23. Hvør skuldi so sloppið at koyrt teg, og hvør skuldi als ikki sloppið at koyrt?**
- Andrea Árting skuldi sloppið at koyrt meg, og George Bush hevði als ikki sloppið at koyrt.

<ph_1>

**Tiðindablaðið Sosialurin**
Postsmoga 76
100 Tórshavn
Tlf. 31 18 20
Fax 31 47 20
Teldupostur: ph_1@sosialurin.fo

**Ábyrgdarblaðstjóri:**
Jan Müller

**Blaðstjórn:**
Ingrid Bjarnastein
Solby Anna Eliasen

<ph_1> er ein partur av Sosialinum annanhvønn mikudag. Evstamark er á middegi fríggjadag

Lýsingar til <ph_1> skulu vera okkum í hendi í seinasta lagi fríggjadagin áðrenn blaðið kemur út.

Lýsingarnar skulu ikki vera størri enn 254 mm breiðar og 70 mm høgar.

## Vit skriva:

Tað letur til, at tað er sera trupult at fáa nakað diskotek ella dans fyri tey ungu undir 18 ár upp á beinini yvirhøvur í Føroyum. Um vit nú hyggja at støðuni hjá teimum ungu í trimum teimum største kommununum í landinum.

Í høvuðsstaðnum hevur ungdómurin havt Badmintonhøllina, har dansur av og á hevur verið, men er hetta farið í søguna nú, tí nú er forboð sett fyri at hava dans eftir klokkan tvey. Fyrireikararnir met a ikki, at tað er grundarlag fyri at hava dans, sum endar klokkan tvey. Tí ikki kann væntast, at eins nógv fólk møta upp.

Í Runavík eru tey ikki væl fyri heldur, tí har hevur ikki verið regluligt diskotek fyri tey ungu í øllum førum tey seinastu tíggju árini. Okkurt tilhaldsstað fyri teimum ungu hevur tó verið, men í dag eru tey við sviðu soð.

Í Klaksvík er støðan heldur ikki frægari. Lognbrá lat aftur í 2001, og í yvir eitt ár, var onki diskotek í býnum. Tað gav at bita á Føstulávint í 2002, tá ungdómar gjørdu uppreistur í Klaksvík, tí tey vildu hava eitt diskotek. Hetta gav úrslit, tí fyrrverandi Lognbrá lat uppaftur við dansi fyri ung seinnapartin av vetrinum. Men Borgin, sum nýggja diskotekið bleiv kallað, lat tó aftur við árslok, og nú er støðan aftur tann sama hjá teimum ungu í Klaksvík. Onki dansistað.

Hvat kann tað vera, sum ger tað so trupult at skipa fyri dansitiltøkum fyri ung? Er ongin áhugi tilstaðar? Tað letur tað ikki til kortini. Tí fólk hava royntat skipa fyri, men hava rent seg í ymsar trupulleikar á vegnum. Eitt nú hølistrupulleikar.

Eru ov lítlir pengar at vinna í tí, tí tey eru undir 18 og harvið er ikki gjørligt at hava skeinkiloyvið? Ella hava tey ungu størsta partin av skuldini sjálvi? Tí tey ikki sjálvi taka seg saman og skipa fyri einum og hvørjum?

Nógv tilkomin fólk tosa um hugburðsbroytingar. Her verður serliga hugsað um, at tey ungu koma ofta rættiliga seint út um kvøldarnar. Kvøldarnar er kanska ov nógv sagt, tí ofta koma tey ikki út fyrr enn væl er liðið út á náttina. Og hví gera tey so tað? Er tað at undrast á – ofta fáa tey kanska bert tann eina tíman við dansinum, tí tey ikki koma út fyrr enn klokkan líður móti trý. Kanska tað hevði verið eitt hugskot at byrja at skipa fyri ungdómsdansum kring landið, sum endaðu klokkan eitt ella tvey, og so møguliga harvið fáa eina byrjan upp á eina broyting í hugburðinum hjá teimum ungu. Hendan møguleikan millum annað nevnir Mark Joensen í stuttum práti við <ph_1> inni í blaðnum. Ikki er gott at vita, hví tað letur til at vera so torført at skipa fyri nøkrum til tey ungu. Men tað er ein sannroynd, at teirra møguleikar til at ganga í dans ella diskotek eru út av lagi vánaligir.

<ph_1>



## Vangamyndin:



## Sólvá Joensen



**Sólvá Joensen úr Havn spælir fótbólt í Elitedivisiónini niðri í Danmark. Hon spælir við danska felagnum SVK. Í Danmark er fótbólturin skjótari, støðið er hægri og venjingin harðari, heldur Sólvá**

24 ára gamla Sólvá Joensen úr Havn hevur spælt fótbólt síðani hon var eini 10 ára gomul. Í Føroyum hevur hon spælt við B36 alt sítt lív, men tá hon fór niður at lesa til miðlatøkning í 2001 fór hon at spæla við SVK.

- Tá eg flutti til Danmarkar var tað ikki meira enn náttúrligt, at eg fór at spæla fótbólt. Í Danmark er støðið hægri, spælið skjótari, meira spennandi og vit venja meira, sigur Sólvá.

Sólvá er tó nú givin við lestrinum, men hon fer helst at byrja upp á okkurt nýtt í summar.

## Føroyskur fótbóltur

Um føroyska kvinnufótbóltin sigur Sólvá, at hann gerst alt meira óseriøsur.

- Tað er stórur munur á liðunum. Kí er nógv tað besta liðið. Eisini er trupult hjá bygdaliðunum at manna lið. Eg veit ikki, hvat er sum ger, at konufólk gevast at spæla fótbólt, sigur SVK leikarin.

Sólvá metir, at hondbólturin er farin avstað við eitt sindur av fólki, og nú er heldur onki kvinnulandslið longur. Tað var eitt í 95-96 til kvalifikatiónsdystirnar til EM. Nú verður sagt frá FSF, at tað er ikki grundarlag fyri at hava eitt kvinnulandslið, tí tað kostar ov nógv at senda tær avstað.

- FSF raðfestir ikki kvinnufótbóltin høgt. Til dømis vóru vit einaferð tríggjar ferðir í Klaksvík fyri at spæla ein dyst, men ongir dómarar møttu upp. Triðju ferð kom ein heimadómari, tí ongin annar var, sigur Sólvá.

Tó vil hon ikki skjóta alla skyldina yvir á FSF. Eisini eru tað tær ungu genturnar, sum kanska ikki ganga so høgt upp í fótbóltin.

- Eisini var tað bløðini, sum ikki gjørdu so nógv burturúr, men eg haldi, at tað eru fyrst og fremst genturnar, sum eiga at gera nakað fyri, at fótbóltinum verður lív lagað.

Viðvíkjandi FSF krevur tað eina hugsjónsbroyting frá báðum síðum - bæði FSF og teimum spælandi kvinnunum.

Sólvá heldur, at tað var í 1998, at tað byrjaði at ganga niður á bakka við kvinnufótbóltinum. Hvat tað var, ið gjørdi tað, veit hon ikki.

Fyrst í '90-unum og mitt í '90-unum vóru nógvar sum spældu fótbólt, og tær vóru eisini eldri enn tær, ið spæla við 1. deild í Føryum í dag. Tá skuldi ein vera 16 ár fyri at sleppa at spæla við einum 1. deildarliði. Nú eru fleiri, sum eru nógv yngri, tí tað er torført at manna lið.

Sólvá fer nú niður aftur til Danmarkar, har hon fer, sum tann einasta føroyska kvinna, at halda fram við at spæla í Elitedivisiónini. Har fer hon at manna plássið hjá SVK sum høgri bakkur ella høgra miðja.

| | |
|---|---|
| **Navn:** | Sólvá Joensen |
| **Aldur:** | 24 ár |
| **Starv:** | Lesandi |
| **Yndisorð:** | Yes |
| **Føðingardagur:** | 18.01.1978 |
| **Hvat vildi tú verða, tá tú vart stórur, tá tú vart lítil?** | Sangari |